Risa íløga í stór frystiskip:

# Thor í Hósvík enn fleiri bein at standa á

**Tá ið felagið keypti 60% av partapeninginum í O. C. Holding á Oyri, segði annar av stjórunum, Gunnbjørn Joensen, at felagið vildi hava fleiri bein at standa á. Nú hevur Thor í Hósvík so aftur gjørt eina risaíløgu, hesaferð í tveir stórar frystitrolarar**

SKIPAKEYP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*– Skipini koma at sigla undir føroyskum flaggi, tey verða skrásett í Hósvík, har vit hava okkara høvuðssæti, og umsitingin av skipunum verður somuleiðis í Hósvík, sigur Gunnbjørn Joensen, annar av stjórunumí Thor*

Tað er dóttirfelagið hjá P/F Thor, P/F Thor Fisheries, sum nú hevur gjørt avtalu um keyp av tveimum stórum frystitrolarum, Hercules og Poseidon.

Gunnbjørn Joensen, annar av stjórunum í Thor, sigur, at hesir trolararnir eru 105 metrar langir, 20 metrar breiðir og hava hvør sína 8050 HP Wartsila maskinu.

## Vigo-røðin

– Skipini eru av sonevndu Vigo-røðini, ið eru 15 systurskip, sum eru bygd í spanska býnum, Vigo. Tey eru bygd í tíðarskeiðinum 1991-1995. Eitt av hesum systurskipum er Athena, sum siglir undir føroyskum flaggi, og sum Thor frammanundan er parteigari í og reiðir út fyri.

Vigo er stórur og kendur fiskivinnubýur í

Spaniu, og her eru eisini onnur føroysk skip bygd, eitt nú Bakur og Stekur, sum Faroe Seafood eigur. Í løtuni verða tvey onnur skip bygd til felagið í Vigo.

## Í Kyrrahavið

Gunnbjørn Joensen sigur í tíðindaskrivi í morgun, at skipini, Hercules og Poseidon, í løtuni eru í Panama.

– Tað fyrra skipið, sum er Poseidon, varð yvirtikið í gjár, 29. februar, og seinna skipið, Hercules, verður væntandi klárt til yvirtøku seinast í februar.

Hann sigur, at bæði skipini komu úr fiskiskapi í Kyrrahavinum við endan av farna ári og fara væntandi aftur til fiskiskap um mánaðarskiftið, februar/mars.

– Talan er um fiskiskap eftir rossamakreli í altjóða sjógvi út fyri suðuramerikansku vesturstrondini, leggur Gunnbjørn aftrat.

Rossamakrelurin verður heilfrystur, pakkaður og síðan fluttur beinleiðis inn á marknaðin við farmaskipi.

– Hvørt skipið hevur eina framleiðsluorku, sum er 280 tons av lidnari vøru um samdøgnið, sigur Gunnbjørn Joensen.

## Manning og flagg

Manningartalið umborð á Hercules og Poseidon fer at liggja um 120 á hvørjum skipi í senn.

Stjórin sigur, at manningin verður úr ymiskum londum, eitt nú Føroyum, Noregi, Ruslandi og Kina.

– Skipini koma at sigla undir føroyskum flaggi, og tey verða skrásett í Hósvík, har vit hava okkara høvuðssæti, og umsitingin av skipunum verður somuleiðis í Hósvík, leggur hann aftrat.

## Fígging og veitarar

Gunnbjørn Joensen sigur, at tað eru føroyskir fíggingarstovnar við Eik Banka á odda, sum hava víst stórt áræði.

– Keypskostnaðurin fyri bæði skipini liggur um 300 miljónir krónur, og hetta er føroyska fígging burtur av.

Hann sigur, at fleiri føroyskir veitarar standa seg væl í altjóða kapping.

– Vit hava keypt meginpartin av trolútgerðini frá Vónini, og skipini eru tryggjað hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, sigur annar av stjórunum í Thor, Gunnbjørn Joensen.



*Thor spennir seg rættiliga út. Her er føroyska Merkið vundið á stong, og á skipssíðuni stendur nú Hósvík*




*Athena, Poseidon (mynd) og Hercules taka seg væl út. Hetta eru skip, sum eru bygd í sonevndu Vigo-røðini, ið fevndi um 15 systurskip*